B71-B68 0-5 (0-3):

# Tølini lúgva

**Tølini eru vanliga ein ímynd av beiska veruleikanum, men hóast úrslitið á Sandi kundi bent á eina niðurspælan av vertunum, so var tað kortini ikki soleiðis, tá B68 vitjaði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani teir fyri viku síðani taptu fyri FS Vágum, hava fólk flest verið greið um, at tað fór at gerast sera torført hjá sandoyingum at lívbjarga sær í bestu fótbóltsdeildini.

Við eini sera torførari dystarskrá, tóktist tað longu undan dystinum sunnudagin at kalla ógjørligt hjá sandoyingunum, og í øllum førum líktist tað eini treyt, at stig skuldu fáast burtur úr heimadystunum, sum eftir vóru. Eisini hóast hesir vóru móti liðum sum B68 og HB.



*Fyri tað mesta vóru tað sandoyingar, sum vóru í álopi, men málunum tóku gestirnir av Toftum sær av*
*Mynd: Emil Simonsen*

### B71 trýsti

Á pappírinum var tað helst dysturin móti toftamonnum, sum var hin torførari av hesum báðum, men fyrstu góðu løtuna sást so einki til, at tað vóru geistirnir, sum spældu við í oddinum, meðan heimaliðið av álvara nærkast niðurflytingini. Sandoyingar høvdu at kalla alt spælið, og móti illa skipaðu B68-verjuni var tað fleirii ferðir um reppið, at støðurnar gjørdust heilt vandamiklar.

Hóast tað soleiðis var framman fyri málið hjá Kjartani Nesá, at mesti vandin var, so var tað hinumegin, at tey trý málini í fyrra hálvleiki komu, og hetta er eisini ein stór undirstrikan av, hvussu trupult tað ofta er at vera botnlið.

Sandoyingar trýstu sum sagt, men best sum teir tóktust at yvirtakað alt spælið, fór B68 í álop. Bólturin endaði úti hjá John Hera Dam, sum legði innfyri, og eftir at sandoyingar fyrst fingu skumpað bóltin nakað út frá, kom Marlon Jorge rennandi, og hann smekkaði til í málið.

### Punkteraðu

Hetta fyrsta málið broytti sum so einki um dystin. Um nakað, so fekk hetta helst toftamenn at leggja seg enn longur aftur á vøllin, soleiðis at teir ístaðin kundu dúva upp á kontraálop, men tað var tó heldur ikki líkt til, at nakað serliga nógv av hesum fingust í lag.

Móti endanum av hálvleikinum høvdu sandoyingar tó mist nakað av luftini. Í royndunum at trýsta vóru teir ikki heilt savnaðir, tá talan var um verjuskyldur, og so var tað at B68 enn einaferð smekkaði til.

Upptaktin til málið var eitt innkast í høgru síðu. Eftir at Hans Fróði fyrst hevði longt, fekk Arnold fatur á bóltinum, og tá hann legði inn til Fróða, skuldi landsliðsmaðurin bara stýra bóltinum seinasta pettið inn um.

Sandoyingar fóru av álvara niður við høvdinum av hesum, og tá so B68 løtu eftir økti enn meira, mundu tey flestu rokna dystin fyri at vera avgjørdan. Fróði Benjaminsen byrjaði álopið, tá hann sendi John Hera Dam avstað. John Heri dróg nakað omaneftir, áðrenn hann sendi inn til ein púra leysan Arnold Joensen, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar av at skora.

Hóast teir nú vóru aftan fyri við trimum málum, so royndu heimamenninir eisini í seinna hálvleiki at leggja trýst á. Veðrið var farið at versna, at í undanvindinum, sum vertirnir nú høvdu, royndu teir at ota seg longur og longur oman.

Tað var tó sum um, at lagnan langt síðani hevði gjørt av, at stig skuldu tey ikki fáa á Sandi, og veruligar møguleikar gjørdist talan sum so heldur ikki um. Ein ørgrynna av hornaspørkum varð send innfyri, men antin hevði verjan við Hans Fróða á odda tamarhald á støðunum, ella eisini tók veteranurin í B68-málinum, Kjartan Nesá, sær av bóltinum.

Spælið gjørdist eisini alt meira ófantaligt, samstundis sum frustratiónirnar á vøllinum øktust, og alt endaði so eisini á nøkun lunda sama hátt, sum tað gjørdi í fyrra hálvleiki. Toftamenn fingu tvey mál – sandoyingarnir einki, og so kundi tað sum so gera tað sama, hvørt parturin hevði roynt mest.

Fóði Benjaminsen var í báðum førum málskjútti. Fyrst eftir enn eitt innkast, sum Hans Fróði fyrst fekk kollin á. Bólturin datt til John Hera, og tá hann sendi inn, smekkaði Fróði til fyrstu ferð.

Seinnu ferðina varð hann leiktur leysur av miðvøllinum, og eftir at hava dribl-að fram við Waldemar, kundi hann at enda leggja bóltin í málið.

### Árið tykist vera farið

Sigurin hjá toftamonnum mest sum staðfesti, at teir nú liggja sera væl fyri í kappingini at fáa bronsumerkini. Teri eru nú fýra stig undan næstu kappingarneytunum, og hóast tað enn eru fimm dystir eftir at spæla, so er í løtuni ilt at síggja, hvør skal taka toftamenn í hesari kappingini.

Sandoyingar hava hinvegin helst ilt við at síggja, hvussu teir skulu verða verandi í bestu deildini. Dysturin sunnudagin undirstrikaði aftur, í hvussu lítlan mun teir hava havt hepnið við sær í ár. Í fleiri dystum hava teir verið mest sum spælstýrandi, men talan er vorðin um alt ov nógv tepur tap, sum so bara eru vorðin størri og størri, sum árið hevur liðið.
Hesa ferð varð aftur talan um stórtap, og um teir ikki fara at fáa stig eitt av teimum báðum komandi vikuskiftunum, so lítið at ivast í, at árið er farið fyri terira viðkomandi. Teir hava tá tríggjar torførar útidystir eftir, og neyvan ber til at ímynda sær, at teir fáa stig í hesum.

**B71-B68 0-5 (0-3)**
0-1: “Marlon” Jorge 16
0-2: Fróði Benjaminsen 38
0-3: Arnold Joensen 40
0-4: Fróði Benjaminsen 58
0-5: Fróði Benjaminsen 88

**Dómari:** Niklas á Líðarenda (GÍ)

**B68:** Kjartan Nesá – Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Messias Parreira – Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Jan Dam, John Heri Dam, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Súni Fríði Johansen
**B71:** Waldemar Nowicki, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen , Bjørn Thorsteinsson - Hans Jørgen Djurhuus, Julian Florescu, Jónsvein Thomsen, Ib Mohr Olsen, Svenning W. Hansen - Eli Hentze, Kári Nielsen

NSÍ-KÍ 3-2 (1-1):

# So steðgaði KÍ

**Eftir at teir síðani summarsteðgin hava otað seg upp móti bronsuplássinum, máttu teir eftir tapið í Runavík ásanna, at talan neyvan verður um heiðursmerki í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at KÍ seinastu vikurnar hevur gjørt um seg á stigatalvuni, vóru fólk í Klaksvík so smátt farin at hugsa um møguleikan fyri heiðursmerkjum hetta kappingarárið. Ein møguleiki, sum annars tóktist rættiliga fjarður eftir vánaligu byrjanina upp á árið.

Skuldi hetta gerast so, var tó neyðugt við einum sigri í Runavík, og hóast KÍ vanliga hevur havt tað trupult móti NSÍ, so vóru fortreytirnar fyri hesum rættiliga góðar hesa ferð móti einum NSÍ liðið, sum hevur lítið annað enn æruna at spæla fyri, tað sum eftir er av kappingini.

### Hugburðurin bilaði

KÍ liðið hevur hinvegin havt ein sera góðan hugburð síðani summarsteðin. Leikararnir hava fyrst og fremst staðið væl saman sum eitt lið, og hetta hevur so eisini viðført, at sjálvt spælið á vøllinum hevur gingið betri.

Sunnudagin var tó sum KÍ fyri eina tíð hevði gloymt alt um stríðsviljan og ágangandi fótbóltsspælið. Teir høvdu høvdu bóltin nógv í Runavíkini, men tað var tó sera sjáldan, at talan gjørdist um nakrar vandastøður framman fyri málið hjá Jens Martini Knudsen.

Hinvegin vóru runavíkingarnir sera beinraknir, tá teir settu ferð á niðaneftir. Ferð eftir ferð varð KÍ verjan tagað sundur av longum sendingum út í borðini, men teir heilt opnu møguleikarnir gjørdist talan tó ikki um.

Dysturin tók tó eina brádliga vend um miðjan hálvleikin, tá jugoslaviski álopsmaðurin hjá KÍ, Alexander Djordjevic, tók málið í at kalla egnar hendur. Skjótt samanspæl í borðinum endaði við, at Alexander smoygdi sær leysan av verjuni hjá runavíkingum, og einsamallur við Jens Martini sendi hann bóltin í meskarnar.

Hetta gav klaksvíkingum eitt sindur av luft undir veingirnar, og næstu løtuna gekk at kall alt spælið fyri seg niðri við NSÍ-brotsteigin.

Verjan við Djóna N. Joensen og Arnfinni Langgard megnaði tó at halda tørn, og brádliga fingui runavíkingarnir málið, sum mest sum burtur úr ongum fekk teir inn aftur í dystin.

KÍ misti bóltin í uppspælinum høgru megin, og eftir at runavíkingar sera skjótt spældu seg ígjøgnum, stóð Gert Langgard leysur í brotsteiginum og langaði bóltin í málið.

### Sjúrður avgjørdi

Runavíkingar kundu tí halda høvdið nakað hægri, tá farið varð til hálvleiks, og tað var sjónligt, at teir í seinna hálvleiki høvdu fingið tamarhald á aftur spælið.

Vengrirnir vórðu aftur nógv nýttir, og ikki minst hevði Eddie Mikkelsen víðar ræsur í vinstru, men mest sum hvørja ferð varð seinasta sendingni ov óneyv, soleiðis at runavíkingarnir ikki fingu spælt seg til opnar møguleikar.

Tað bragdaði tó um miðjan hálvleikin, eftir ta Ken Nónklett, sum var einsamallur á toppinum, varð feldur á veg inn í KÍ brotsteigin. Dómarin dømdi fríspark á brotsteigarmarkinum, og Sjúrður Jacobsen varð settur at skjóta. Manngarðurin hjá KÍ stóð helst ikki akkurát soleiðis, sum hann skuldi gera, og uttan at hugsa stórvegis um at skrúva bóltin, bankaði Sjúrður bóltin upp undir nettakið uttan at Meinhardt Joensen fekk gjørt nakað sum helst við skotið.

### Abraham aftur á vølli

Runavíkingar vórðu nú greitt við yvirlutan. Partur av spæliætlanini var at yvirfólka miðvøllin, og hetta tóktist eisini at rigga heilt væl, soleiðis at KÍ als ikki fekk glið á sítt álopsspæl.

Harafturat kemur, at NSÍ til dystin hevði gjørt nýtslu av einum gomlum trumfi. Abraham Løkin kundi væl verið pápi at fleiri av spælarunum á vøllinum, men hóast hetta, so spældi hann í samfullar 90 minuttir sunnudagin, og hann stóð heldur ikki pettið aftan fyri hinar leikararnar. Hann vann hópin av bóltum. Tók ábyrgd á seg, tá spælið skuldi skipast, og drúgvu royndir hansara gera so eisini, at tað er ikki annað enn náttúrligt, at tað er hann, sum hevur leiðandi leiklutin á miðvøllinum.

KÍ royndi at broyta eitt sindur upp á liðið, til tess at koma inn aftur í dystin, og partvíst eydnaðist hetta eisini við innskiftingunum av teimum báðu hálvskaddu Allan Joensen og Hjalgrím Elttør. Serliga gav Hjalgrím NSÍ verjuni trupulleikar, men mál spurdist tó einki burturúr, og ístaðin kundu runavíkingar so avgera, tá fimm minuttir vóru eftir at spæla. KÍ misti enn eina ferð í uppspælinum. Bólturin støkk til Sjúrð Jacobsen, sum gjørdi skjótt av og smekkaði til.

KÍ fekk eina lítla troyst móti endanum, tá brotsspark varð dømt móti runavíkingum, men hóast Kurt var ósvikaliga tryggur úr ellivu metrum, so vendist ikki. Runavíkingar fingu ikki stórt meira enn givið bóltin uppaftur, so hevði dómarin blást dystin av.

### Ov tunt

Sum nevnt í byrjanini, so høvdu runavíkingar lítið annað enn æruna at spæla fyri, og tí er tað helst avmarkað, hvat teir kunnu nýta sigurin á klaksvíkingunum til.

Hinvegin er lítið at ivast í, at klaksvíkingar munnu iðra seg um stigamissin, sum viðførdi, at teir meira ella minni mistu sambandið við bronsumerkini.

Hetta speglar tó eisini ein stóran trupulleika, sum KÍ hevur havt at dragast við. Nevnliga at hópurin er sera tunnur, og at spælið tí gerst ógvuliga óstøðugt, um einstakir leikarar resta í. Hesa ferð tóktist saknurin í Hjalgrími Elttør sjónligur. Hann fekk ein snudd á landsliðsferðini, og at hann kortini varð sendir á vøllin, boðar eisini frá lítlu breiddini, sum hópurin hevur.

Hinvegin er einki dulsmál, at fyri ein part er talan hjá KÍ um leikarar, sum felagið kann fáa gleði av nógv ár fram í tíðina og megnar felagið at byggja víðari á teirra herðar, sum helst eru vorðnir nakað breiðari í ár, so er kanska als ikki so langur vegur, áðrenn KÍ aftur fer at hava ein leiklut í føroyska fótbóltsoddinum.

**NSÍ-KÍ 3-2 (1-1)**
0-1: Aleksandar Djordjevic 23
1-1: Gert Langgaard 36
2-1: Sjúrður Jacobsen 69
3-1: Sjúrður Jacobsen 86
3-2: Kurt Mørkøre (br.) 89

**Dómari:** Jens Petur Brattalíð (VB)

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Jónsstein Petersen – Gert Langgaard, Sjúrður Jacobsen, Abraham Løkin, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Ken Nónklett
**KÍ:** Meinhardt Joensen – Ove Nysted, Jan Andreasen, Andreas Jacobsen – Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Fríðin Ziskason, Tomislav Sivic, Atli Danielsen – Kurt Mørkøre, Alexander Djordjevic



VB-HB 2-0 (0-0):

# Moyrir havnarmenn

**Uttan fleiri av stuðulsspælarunum var VB ein alt ov stórur biti hjá einum blaðungum HB-liðið, sum nú hevur mist alla vón um heiðursmerki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði liðini, sum í fjør runnu um kapp eftir gullmerkjunum, hava í ár átikið sær nakrar heldur meira eyðmjúkar leiklutir, har tað fyrst og fremst hevur verið stríðið um bronsumerkini, sum hevur upptikið áskoðararnar hjá felgøgunum.

HB var tó eitt skifti tíðliga í kappingini sera væl við, men eftir at teir fleiri ferðir snávaðu ella hálvsnávaðu, øktist munurin upp til ovaru liðini dekan ov nógv øktur. Fram til summarsteðgin varð tó framvegis roknað við, at HB kundi gera seg galdandi í bronsudystinum, men hesin møguleikin tykist nú vera fullkomuliga farin fyri skeyti, eftir at liðið hevur tapt fyri bæði KÍ og VB.



*Robert Cieslewicz og teir úr VB srygdu fyri, at HB datt heilt burtur úr dystinum um heiðursmerki*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Nógvir restaðu í

Til dystin móti VB kom HB annars suður við einum liði, sum í nógva rmátar líktist einum styrktum unglingaliðið. Menn sum Pól Næs Joensen, Bárður Christiansen, Ransin N. Djurhuus og Høgni Mohr Joensen hava so avgjørt ikki leikt teir heilt nógvu minuttirnar á besta HB-liðnum, og tað tóktist eisini skjótt greitt, at móti drúgvu royndunum hjá heimaliðnum fóru hesir at formáa sær lítið.

Spæliætlanin hjá HB tóktist eisini heilt greitt at vera tann, at bindast skuldi fyri í verjupartinum, fyri síðani møguliga at fáa okkurt kontraálop í lag, og fyrstu trý korterini eydnaðist sum so eisini at halda hesa. VB hevði vindin undan og trýsti rættiliga nógv oman móti HB málinum, men í nógvum førum hjálpti vindurin, soleiðis at bólturin rann undan, og tó at VB hevði einar tvær ella tríggjar heilt naskar royndir, so hevði bólturin so framvegis ikki verið í netinum, tá farið varð til hálvleiks.

### Gekk betri ímóti

Í álopspartinum høvdu vertirnir so avgjørt ikki skapt nakað nevnivert ímóti vindinum undan stegðin, og í seinna hálvleiki gjørdist nærum eiðasørt í so máta.

VB fekk nógv betri samanhang í sítt spæl, nú teir høvdu vindin ímóti. Tað riggaði nógv betri at leggja bóltin fram eftir vøllinum, uttan at úrslitið hvørja ferð gjørdist eitt málspark, og í verjuni høvdu afturvendu tvíburðarnir gott tamarhald á teimum ferðunum, tá HB dittaði sær niðan eftir vøllinum.

Tað var eisini nú, at tað eydnaðist VB at skora, men hóast máli mátti sigast at vera uppiborið, so mundiu teir í HB tó koritni iðra seg um málið, sum tóktist heldur óneyðugt. Mark Wierzbicki fekk bóltin nakað framman fyri miðjuna, og eftir at hava drigið seg oman í brotsteigin, smekkað pólverjin til. HB málverjin átti helst at hava hildið skotinum, men tá hetta ikki eydnaðist, var altíð vandamikli Birgir Jørgensen á staðnum, og so var dysturin mest sum avgjørdur.

Í øllum førum var sera torført at síggja, hvussu HB skuldi fáa eitt mál burtur úr dystinum, tí hóast teir nú vóru aftanfyri, so megnaðu teir ikki á nakran hátt at trýsta VB longur niðan á vøllin.

VB var framvegis spælstýrandi, og um miðjan hálvleik eydnaðist teimum so eisini at fáa málið, sum væl og virðiliga avgjørdi dystin. Marek spældi út í vinstru til Jón Paula, sum dróg skjótt oman móti brotsteiginum. Komin oman til brotsteigin sendi hann hart og flatt innfyri, og millum vinir og fíggindar endaði bólturin onkursvegna í málinum.

### Fáa royndir

Við sigrinum syrgdu vágbingar fyri, at teir framhaldandi halda fast um møguleikan at vinna sær bronumerki, og har við eisini atgongumerki til enn eitt ár úti í Europa. Skaðarnir, sum teir hava drigist við seinastu tíðina tykjast nú eisini at vera lagdir aftur um bak, og so er spurningurin, hvat teir megna at gera, tá teir komandi vikuskifti fara til Gøtu á vitjan.

Hjá HB er hinvegin alt tos um heiðursmerki tagt burtur fyri árið. Liðið er í løtuni á einum sjeynda plássi, og hóast teir ikki eru í nøkrum niðurflytingarvanda, so man hetta helst svíða meint hjá sigursvanda felagnum.

Trupulleikin hjá HB er bara, at í løtuni skal liðið ikki rokna við at koma nógv longur upp eftir stigatalvuni. Hópurin hjá teimum er ikki hin breiðasti í landinum, og tá skaðar raka so mikið meint, sum teir hava gjørt í ár, so verður tað sera trupult at standa seg í kappingini um heiðursmerkini.

Hinvegin gevur hetta møguleika at geva blaðungu monnunum nakrar royndir í fyrsta liðs høpi, og kann hetta virka til at betra um møguleikarnar fyri framtíðina hjá hesum leikarunum á besta liðnum, so nýtist árið tó kortini ikki at vera heilt spilt.

**VB-HB2-0 (0-0)**
1-0: Birgir Jørgensen 54
2-0: Jón Pauli Olsen 70

Dómari: Dagfinn Olsen (NSÍ)

**VB:** Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Krzystof Popczynzki, Michael í Lágabø, Jón Pauli Olsen – Birgir Jørgensen, Robert Cieslezicz
**HB:** Pól N. Joensen – Eyðfinn Fjalsbak, Jóhannis Joensen, Bárður Christiansen – Ransin N. Djurhuus, Allan Mørkøre, Rói Árting, Høgni M. Joensen, Janus M. Joensen – Rógvi Jacobsen, Bárður Mortansson